# Hagafundur í Ognarhaganum í Kvívík

Lýst verður til hagafundar í Ognarhaganum í Kvívík 26. september 2007, kl. 19.30 í Glæmuni.

**Skrá:**

Støðutakan til umsóknina frá Grækaris A. Joensen um sølu av jørð Frammi í Gerði til útstykkingar til íbúðarendamál.

Gjørt verður vart við, at tann, sum møtir fyri annan, skal hava skrivliga fulltrú at møta og atkvøða. Hetta er eisini galdandi fyri tey, sum møta fyri medeigarar av somu ogn. Tað merkir, at eiga fleiri persónar eitt matrikul nummar, atkvøða teir hvør sær bert fyri sín part, um so er, at teir ikki hava skrivliga fulltrú frá hinum.

**Hagastýrið**

# Neyst til sølu

Um hóskandi boð fæst, er stórt neyst Millum Bóla í Kollafirði til sølu. Pláss er fyri stórum báti, tá neystið er 11 metrar langt og 5 metrar breitt. Fríhæddin er knappar 4 metrar.

Neystið er nýtt, men ikki heilt liðugt. Perfekt til tann, sum vil innrætta eftir egnum ynski. Loftið er 55 m².

Aðrir fyrimunir eru, at tað er so tætt við Havnina, nærum eingin munur á flóð og fjøru. So veðurgott at altíð slepst at við báti, og tað slepst til neystið við bili.

**Ring 315043,** eftir kl. 18.00
**Frímund Hansen**




**temp-team**
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM



## Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

# Hús til leigu

Sethús í vesturbýnum í Havn til leigu til fólk, sum fara væl um. Víddin er 90 fermetrar, umframt stóran kjallara og hjall (uml. 40 fermetrar).
Stutt er til skúla, buss og barnagarð.

Mánaðarlig leiga er 7.500 kr. + ljós og hita.
(1 mðr. depositum krevst).

***Bill.mrk. 3541***

## Lastbilførari við kranaloyvi søkist

Vinarliga ring 217946
Sp/f Álvur Ziska

# SJÓBJARGINGARSTØÐIN MRCC- Tórshavn

E-mail: mrcc@mrcc.fo * www.mrcc.fo
Tlf: +298-351302 * Fax: +298-351301
Inmarsat C: 423 116210

## Fráboðan um kaðalskip á føroyskari havleið

Lýst verður, at kaðalskipið "I.T. Intrepid" leggur ein fipurkaðal úr Shetlandi til Føroya.

| | |
|---|---|
| Skipanavn | I.T. Intrepid |
| Kallibókstavir/Flagg | 8PSH / Barbados |
| Føroya Tele umboð umborð | Súni Joensen, tlf +298 243605 |
| Umboðsmaður í Føroyum | Janus Djurhuus, tlf +298 243672 |
| Hjálparskip | Stevns Arctic |
| Kallibókstavir/Flagg | OWXV2/ Danmark |

Samband fæst við " I.T. Intrepid " á VHF rás 16.

Skip og bátar verða biðin um at halda trygga frástøðu frá kaðalskipinum.
Samstundis verður heitt á øll, ið eiga fiskireiðskap á leiðini um at flyta hann .

Upplýsingar um dagligar knattstøður fáast á:
*http://www.sailwx.info/shiptrack/shipposition.phtml?call=8PSH*
ella frá MRCC á telefon 351302.

**Sjóbjargingarstøðin**

## BRÓÐURRINGURIN Á HAVINUM

Ársfundurin 2007 verður **vikuskiftið 14.-16. september 2007** í Leirvíkar Missiónshúsi har øll eru vælkomin

**Fríggjadag 14/9** Alment møti **kl. 20.00** við Ásmund Bertelsen, Strendur og Hasseman Mikkelsen, Leirvík. Menn syngja av Strondum

**Leygardag 15/9** Alment møti **kl. 20.00** við Hanus Lassen og Suna Bjartalíð, Klaksvík. Streingjakórið í K.F.U.M. & K., Klaksvík syngur

**Sunnudag 16/9** Altargangsgudstænasta **kl. 11.00** við Una Næs, presti

**Sunnudag 16/9** Alment møti **kl. 18.00** við Marius Jacobsen og Petur Adrian Jacobsen, Leirvík. Manskór úr Fuglafirði syngur

Limafundur verður **leygardagin 14/9 2007 kl. 15.00** við Ellindi Abrahamsen, Fuglafjørður

***Stýrið fyri Bróðurringin á Havinum***

# Dansifelagið Fragdin Hósvík

**Byrja verður at dansa sunnukvøldið 30. september í bygdarhúsinum í Hósvík.**

**Byrjunarholdið kl. 18-20**
**Vand kl. 19-21**

**Nyggir limir ið duga at dansa vals og foxtrot eru hjartaliga vælkomnir**

**Dansiskeiðið 07/08 kostar kr. 600,- við limagjaldi**

**Tilmelding á tlf. 422291 ella 265844**



Dansifelagið Fragdin